# Leiðin er greið, tá lagt verður frá kei

**Nýggjasta tilboðið til innrættingarhugaðar føroyingar er eitt longt vikuskifti við Norrönu til Bergens, har starvsfólkini í IKEA standa við opnum ørmum og taka ímóti.**




LÍVSTÍLUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Í tráð við nýggjasta rákið innan sús og hús og skáalán, verður nú ein nýggjur kapittul skrivaður inn í shoppingarsøgu føroyinga. Tí, fyrsta vikuskiftið í november fremja føroyingar eina friðarliga og óvápnaða, men kortini kostnaðarmikla hertøku av norska stórbýnum Bergen. Innrásin verður skipað av keypshugaðum húsfrúm, harav onkur teirra helst tekur mannin við - um ikki sum spýggjubakkaheintari, so í øllum førum sum berari.

**IKEA – here we come!!**
Í lýsingarátakið hjá Smyril Line, er nýggjasta tilboðið eitt longt vikuskifti við Norrönu til Bergens, har eitt nú starvsfólkini í IKEA standa við opnum ørmum og taka ímóti. Ein heilan dag sleppa fólk at keypa í handilshúsinum, og úti á parkeringsøkinum stendur ein stór bingja, við áskriftini: FAROE ISLAND, har til ber at lossa allar vørurnar uppí – líka frá sofum til køkar.

Úr Bergen verður skemtandi tikið til, at bæði IKEA og H&M hava bílagt eyka partí av vørum úr nýggjastu vetrarkollektiónini, tí norðmenn eru ávaraðir um stimarnar av føroyingum, sum fara at jolla sær inni á meginlandinum hetta longda vikuskiftið.

**Katalogmentanin**
Nógvir føroyingar nýta í minsta lagi ein dag av Danmarkarferðini í Ikea í Tåstrup. Men tá eru vit ofta avmarkað av, at vørurnar mugu flytast við bussi og toki heim í býin og út á flogvøllin. Tí endar tað ofta við smátingum, lampum og gardinum ella onkrum hissini køksluti.

Ella vit sita heima og ynskja okkurt úr árliga kataloginum, sum boðar frá einum familjuvinarligum, sólbrendum og eydnuríkum IKEA-fólkaheimi. Og hvønn stíl skal eg velja? Svenskan skergarð, polkaprikkar, nostalgi, vintage ella retro? Máti upp og skrivi niður, upp og niður, ROGER ella ARON, hvønn skal eg velja?

**Eg eigi IKEA**
Men alt hetta er ikki tað sama sum at uppliva eitt veruligt IKEA-handilshús, sum onkursvegna er so dragandi, við sínum sermerkta dámi, ljóst, friðarligt og dreymakent. Siðbundið við svenskum kjøttbullum og eyðkendum merkiseðlum, har upplýst verður, hvar í goymsluni vøran er at finna. Nýmótans og einfalt, men samstundis persónligt.

Og so er tað púra ógjørligt ikki at lata seg freista av fagurtlittum plastkrússum við 12 í pakkanum, serviettum fyri eina tíggjukrónu, elskuligum baðifyrihangum við naivistiskum djórum ella einum skríggjandi grønum upptrekkjara, sum stendur sjálvur. Og fyri ikki um at tala: barnadeildin, sum ongin í Føroyum røkkur upp til knýggja...

Helst er tað samanrenningin av einfalda sniðinum, bíligu prísunum og einum sterkum brandi, sum ger, at eg fái hug at vitja IKEA aftur og aftur. Tí okkurt innan í mær sigur, at IKEA er mín handil. Og eg kenni ikki eina kvinnu, sum ikki kundi brúkt meira pening enn hon eigur, í einum IKEA handilshúsi.

Heimafturkomin er hent at hava onkran góðan undir liðini, tá brúnu pappeskjurnar verða latnar upp og stovan fyllist við flamingokúlum og hvar fór nú hobbyknívurin? Og undan kavi kemur reólveggurin í fimm túsund bitum, sum skulu setast saman. Tí ongin kvinna er heil, fyrr enn hon eigur sína egnu og persónligu skrúvumaskinu!



”

***Hanna Mohr Müller, úr Havn, við dótrini Rebekku***
*Eg kundi væl hugsað mær at farið ein túr við Norrønu til IKEA í Bergen. Fari altíð í IKEA, tá eg eri niðri, tí vørurnar har eru lekrar og bíligar. Vanliga bíleggi eg katalogið á netinum, so eg veit altíð, hvat er at fáa. Vit eiga nógvar lutir, sum eru keyptir í IKEA, men tað er eitt sindur keðiligt, tá man fer niður, tí tá er avmarkað, hvat tú fært tikið við heim, tá tað skal við í flogfarið.*



”

***Helga Hansen úr Havn, situr í Snarskivuni***
*Eg havi ofta shoppað í IKEA, tá eg eri niðri. Mest smáting og lampur, og ikki stórar møblar. Har er bíligt og vøruúrvalið er nógv størri enn í Føroyum, tí her selja øll stórt sæð tað sama. Haldi avgjørt tað hevði verið spennandi at farið við ein IKEA-túr til Bergen.*

# Jokeren til Føroyar

**Í samband við mentanarvikuna í Runavík verður ein rimmar konsert í tann 28. oktober í høllini í Runavík. Og tað eru ikki hissini bólkar sum fara at spæla. Marius, Frændur og Showmenn mynda tann føroyska partin av kvøldinum, men ongin ivi er um, at høvuðsnavnið kemur úr Danmark. Og tað er ongin minnið enn "stodder #1" – Jokeren.**

KONSERT
*Rókur Jákupsson Jakobsen*
*rokur@sosialurin.fo*

**Hvor du fra?**
Jokeren er ein sonn dreingjareyv á danska tónleikapallinum. Hann er ein "tuff-guy", sum er komin til pengar, og hann dugur at brúka teir. Dýrir bilar, vøkur klæði og sjampanja eru ein natúrligur partur av hip hop sjangruni, og Jokeren er onki undantak. Tað er "bling-bling" fyri allar pengarnar.

Men tað sum hann dugur allarbest er at rappa. Fyri nøkrum árum síðan hevði hann eitt risa "hit" í norðurlondum. Hvør minnist ikki við sangin "Hvor du fra - Jeg fra Havnen"?

Stílurin hjá Jokeren er rættiliga nútímans, og í Danmark verður hann sæddur sum ein av teimum bestu rapparunum í landinum. Jokeren eitur í veruleikanum Jesper Dahl.

Jokeren er í løtuni fløguaktuellur við fløguni "Gigolo Jesus".

**Mentanarvika**
Í oktober mánaða verður aftur skipað fyri Mentanarviku í Runavíkar kommunu. Vikan byrjar sunnudagin 22. og endar sunnudagin 29. oktober.

Býurin bjóðar uppá listaframsýningar, tónleikatiltøk, Open by Night, barnatiltøk, føroyskan dans, fyrilestrar og mangt annað. Undirhald og mentan fyri øll.

Í somu viku verður altjóða vinnustevnan, iðhevur heitið Faroexpo 2006, hildin í Runavík. Tað er fyritøkan Virkisráðgeving í Saltangará, sum samskipar vinnustevnuna. Faroexpo verður hildin í døgunum 24. til 26. oktober 2006.

Talan er um eina undirhaldandi og spennandi viku hjá bæði almenninginum og hjá teimum fyritøkum, ið luttaka á vinnustevnuni. Ein rættur blandingur av mentanarligum undirhaldi og fakligum innihaldi, stendur at lesa á www.runavik.fo .

Hetta er ein stevna sum hevur við vinnu at gera, men við konsertini verður roynt at samantvinna vinnu og mentan. Rannvá Troest arbeiðir í Kunningarstovuni í Runavík, og hon er sum vera man spent uppá stóra tiltakið.

–Vit hava verið í samband við ungdómin her norðuri, og hava soleiðis fingið at vita, at tað hevði verið stuttligt at hoyrt Jokeren. Tískil valdu vit at taka ungdómin uppá orðið, og fáa henda listamann hendan vegin, greiður hon frá.

Konsertin verður endabresturin á mentanarvikuni, sum verður hildin í Runavík um tað mundið. Í fjør var eisini ein stór konsert. Tá spældu Lena, TÝR og 200. Men hví velja tey at bjóða einum útlendskum listamanni við í ár?

–Vit vilja gjarna gera okkurt øðrvísi í ár. Um tað riggar væl, fara vit at aftur at bjóða einum útlendskum bólki við næsta ár, sigur Rannvá við Sosialin.

**Stór Føroysk nøvn**
Men tað er ikki bara Jokeren, sum verður at hoyra. Føroyski GBOB vinnarin frá í fjør, Marius, skal eisini framføra á konsertini. Marius gav út fløguna "The Sky Is Our Home" í summar, og henda fløgan hevur fingið eina sera góða móttøku. Ummælini hava næstan bara verið positiv, og sum heild tykist fløgan at vera vælumtókt.

Harafturat verður helst tann besti føroyski bólkurin ígjøgnum árini á pallinum tann 28. oktober. Frændur finna saman aftur til hetta spennandi kvøld. Ongin føroyskur bólkur man hava so nógvar landaplágur í lummanum sum Frændur. Eros, Afrodite, Mítt Land, Millum Mussarnar eru bara nøkur av teimum vælumtóktu løgunum, sum Eyðun, Steintór, Rani & Co. hava givið føroyingum.

Aftaná konsertina fara Showmenn at spæla til dans. Teir eru ein veruligur superbólkur. Kim, James, Johannus og Jens Marni teljast millum teir allarbestu tónleikararnir í landinum, og hetta hoyrist tá ið teir spæla saman.

Atgongumerki fást til keyps longu týsdagin kring alt landið. Atgongumerkini kosta kr. 175.



*Hesin "stoddarin" verður at hoyra í høllini í Runavík*